**Samtak**
Stoffalág 17
Tlf 210013
samtak@samtak.fo
www.samtak.fo

26.08.2022

# Hoyringssvar í samband við uppskot um oljuískoyti

Tað er gleðiligt at uppskot endiliga er komið um at veita eina ávísan stuðul til familjur, men hetta er alt ov lítið og kann ikki standa einsamalt, tí hetta rakar ikki nóg væl nógvar familjur, ið eru hart sperdar av íkomnu støðuni við ógvusligum príshækkingum á at kalla øllum økjum.

Tað eru ymiskir bólkar, sum eru sperdir av íkomna prísvøkstrinum, og tískil er eisini neyðugt, at gjørt vera ymisk átøk, soleiðis at til ber at fevna tær ymisku familjurnar, ið eru harðast sperdar.

**Viðmerkingar til verandi uppskot**

Mælt verður til at broyta inntøkuupphæddirnar í uppskotinum – mælt verður til at hækka upphæddina, har tað er ein vaksin til 1,25 arbeiðaralønir og at hækka upphæddina, har tað eru fleiri til 2 arbeiðaralønir.

Vit halda, at rættast er at halda seg til hugtakið arbeiðaralønir, tá ið ein slíkur stuðul verður veittur, og at seta mørkini í mun til 1,25 og 2 arbeiðaralønir. Orðingin um arbeiðaraløn er kend í aðrari almannalóggávu, og verður brúkt í eitt nú dagpeningalógini vegna sjúku.

**Mælt verður til, at § 2 b. Verður orðað soleiðis:**

> “**§ 2 b.** Oljuískoyti er 7.000 kr. og kann útgjaldast eina ferð um árið.
>
> Stk. 2. Húski, ið telur ein vaksnan, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag á 1,25 løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum, kann fáa oljuískoyti.
>
> Stk. 3. Húski, ið telur tvey ella fleiri, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag á 2 lønir sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum, kann fáa oljuískoyti. “

**Mælt verður til, at § 11 a. verður orðað soleiðis:**

> “**§ 11 a.** Oljuískoyti kann ikki verða veitt húski, um tey eiga ogn, ið er mett til eina upphædd omanfyri 50.000 kr.
>
> *Stk.* 2. Ogn sbrt. stk. 1 og 2 er ogn nevnd í § 11, stk. 2 og 3.”

Við hesum báðum broytingunum ber til at raka fleir familjur, ið liggja á einum púra vanligum lønarlagi. Eisini er rættast at broyta ognarhugtakið til 50.000 kr, og at gera tað eins fyri allar bólkar.

Rætt er eisini at viðgerða, um oljuískoytið skal fella burtur í einum, ella tað skal fella stigvíst við vaksandi inntøkum omanfyri inntøkumørkini, ið nevnd eru omanfyri. Er tað ikki ov kostnaðarmikið og trupult at seta í verk, eigur oljustudningurin at fella burtur stigvíst. Tá verður eisini stuðla undir hugtakið, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða.

Politiska skipanin eigur at umhugsa, um oljuprísurin ikki fer munandi niður komandi tíðina, at økja tíðarskeiðið til 1. januar 2024, soleiðis at hetta eisini verður galdandi í 2024.

Heitt verður á løgtingið um at bera skjótt at í hesum máli, tí tað eru nógvar familjur, ið eru illa sperdar av ógvusliga prísvøkstrinum, men hetta uppskotið er ov lítið í sær sjálvum. Politiska skipanin noyðist eisini at eftirhyggja familjuískoyti og tær upphæddir, ið har eru. Hesin seinni partur er sera umráðandi at fáa gjørt, tí barnafamiljur eru sperdar.

**Hækkað inntøkumarkið fyri familjuískoyti**

Nú ætlan er at broyta lógina um familjuískoyti við einum eyka oljuískoyti verður staðiliga heitt á politisku skipanina um at tillaga hini inntøkumørkini í lógini, soleiðis at barnafamiljurfamiljur kunnu fáa meir at liva av.

Verandi lóg rakar ikki nóg væl, og tað eru ov nógv, sum detta uttanfyri, hóast hesi als ikki kunnu metast sum havandi høgar inntøkur. Hetta sæst eisini aftur í, at tað framvegis eru áleið 1000 børn í fátækraváða, og at Reyði Krossur seinastu tíðina hevur fingið met nógvar umsóknir um mathjálp.

Mælt verður til at seta markið í § 2 stk 1 í lógini um familjuískoyti til eina arbeiðaraløn ístaðin fyri 220.000 kr. Fyri eitt par, átti talan at verið um tvær arbeiðaralønir. Og har talan er um hækkað gjald fyri stakan í § 2 a kundi upphæddin verið ein hálv arbeiðaraløn ístaðin fyri 120.000 kr og fyri pør í 2 a stk 2 kundi talan verið um inntøkugrundarlag á eina arbeiðaraløn.

Mælt verður tískil til at broyta §2 stk 1, § 2 a stk 2, § 3 stk 1, § 3 a stk 1 og 2 úr kr 220.000 kr til eina løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum. Sum dømi um hetta kundi § 2 stk 1 verið soleiðis orðað:

> "**§ 2.** fyri stakar uppihaldarar, ið hava eitt inntøkugrundarlag á løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum, ella lægri, er familjuískoyti ásett til 24.000 kr um árið, um uppihaldarin hevur 1 barn."

Har ásetingin er kr 120.000 kr – eins og hon er í § 2 a stk 1 og 3 a stk 1 – átti tað at verið broytt til eina hálva løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum.

Fyri pør, har inntøkuásetingin er 320.000 kr eins og tað er í § 2. Stk 3, og § 3 stk 2 og § 3a stk 2 átti tað at verið broytt til tvær arbeiðaralønir.

Eisini eigur tað at verða strikað, í §  3 stk 3 nr 1 og 2, at familjuískoytið fellur burtur, tá ið komið verður uppum eina ávísa inntøkuupphædd.

Politiska skipanin og samfelagið sum heild eigur at hugsa familjuískoyti, sum eitt familjuískoyti og ikki sum okkurt slag av fátækrahjálp til nøkur heilt fá. Neyðugt er í verandi tíðum at fevna breiðari, og tað er ikki órímiligt, at tað hjá einum støkum er ein arbeiðaraløn ella hjá pørum við børnum eru tvær arbeiðaralønum, sum er markið, áðrenn mótroknað verður.

Um hugt verður at verandi prísvøkstri, so hava familjur fingið eyka útreiðslur á at kalla øllum økjum. Nógvar familjur hava fingið eykarokningar á uml. 1000-1600 kr um mánaðin fyri oljuna, matvøruprísirnir eru nógv vaksnir, rentan er hækkað og hækkar óivað meir í heyst umframt at leigukostnaðurin er farin nógv upp. So óansæð um tú eigur títt býli ella leigar, so er talan um fitt av eykaútreiðslum. Lønarvøksturin megnar als ikki at standa mát við prísvøksturin, og tað er lítið í løtuni, sum bendir á, at prísirnir fara at falla aftur í bræði.

At geva oljuískoyti sum skjótast umframt at broyta skipanina við familjuískoyti til barnafamiljur er tí bráðneyðugt at fáa framt. Afturat hesum er neyðugt at hyggja at øðrum átøkum, og at fáa greiningar av, hvat skal ein familja hava til at kunna liva eina rímiliga tilveru í Føroyum í dag.

Føroyar eru eitt ríkt land, sum hevur stóra framgongd í fólkatalinum og nógvan vøkstur annars. Tað eru tó verri enn so øll, ið hava fingið lut í hesum vøkstri og ríkidømi. Neyðugt er at eftirhyggja skipanir, upphæddir í skipanum og um hesar standa mát við broytta veruleikan.

**Vegna Samtak,**

Georg F. Hansen, formaður í Føroya Arbeiðarafelag

Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag

Jastrid Niclasen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

Absalon Hansen, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag